## DAGSINS MEINING

# Tignin og álitið mugu endurskapast

Í nýggjari tíð tykist tað vera søga, at løgtingsval er fjórða hvørt ár. Hetta valskeiðið er ikki tvey ára gamalt. Næstsíðsta skeiðið vardi í samfull fýra ár, meðan tey frammanundan ikki hava verið so long

Politikkurin í níti árunum hevur verið eyðkendur av misáliti. Eftir kreppuna fyrrapartin av tíggju ára skeiðnum var tað ikki so merkiligt, tí tá var so mangt, sum tað ikki hevði verið. Men tað er ein óskikkur, tá ið samfelagsgongdin annars er, sum tað kann roknast við, at hvør dagur skal vera merktur av tí óvæntaða, og at samgongufelagar ikki skulu hava álit hvør á øðrum.

Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur, segði í útvarpinum fyrrapartin í gjár, at hann helt tað, sum hevur gingið fyri seg, vera so mikið lítið virðiligt, at eftir hansara meting hevði øll tann politiska skipanin spælt falitt. Íroknað pressan, legði hann afturat.

Vit eiga øll at taka í egnan barm og rannsaka okkara lut í skipanini. Tað er sunt, og tað eiga vit altíð at gera.

Valstríðið er longu byrjað. Tað hoyrdu vit á viðmerkingunum í Løgtinginum í gjár. Okkara áheitan skal vera, at tað nú fer at snúgva seg meiri um politikk og minni um persónar. Vit vita væl, at tað ber illa til at loysa persónarnar frá politikkinum, tí tað eru politikarnir og politisku flokkarnir, sum mynda politikkin.

Men tað má halda uppat, sum vit seinastu tíðina hava verið vitni til. Henda samgongan hevur hingið saman, síðani valið 30. apríl í 2002. Tað hevur verið meiri ein spurningur um at varðveita taburettirnar og at halda øðrum frá taburettunum, enn tað hevur verið ein spurningur um at føra politikk. Tað var fullkomuliga skeivt frá fyrsta degi, og skilið hevur verið har eftir.

Um vit sammeta við ítróttin, so hevur tað verið soleiðis, at bólturin hevur verið uttanfyri vøllin, og meðan tað hevur verið bíðað eftir innkasti ella málsparki og hornasparki, so hava spælararnir sparkað og sligið hvønn annan og rópt og spýtt eftir hvørjum øðrum. Hetta ber ikki til.

Veljarin eigur at rokna við og krevja, at politisku flokkarnir greitt melda út, hvat teirra ætlanir eru. Tað eigur at vera miðjað eftir einari samgongu, sum hevur breiðan meiriluta aftanfyri seg. Politiska skipanin og samfelagið alt sum tað er, hevur brúk fyri konsensus. Vinnan, mentanin, kommunurnar, vælferðarskipanin og you name it skulu vita, hvat gongur fyri seg og havt tey kunnu rokna við.

Politisku flokkarnir, einstøku politikararnir, pressan og vit øll hava eina stóra ábyrgd fyri hesum samfelagnum, nú tað verður farið undir valstríðið. Løgmaður skal hava tøkk fyri, at hann tók stigið til at reinsa politisku luftina. Tað var einki annað at gera. Uttan mun til hvør orsøkin var til tess. Nú mugu vit so vóna, at politiska luftin verður reinsað. Annars eru vit líka vítt sum sítt. Latið okkum seta skjøtil á eina nýggja byrjan/tíð í føroyskum politikki, har virðingin og konsensus standa ovast á breddanum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# PR Højgaard og etikkur

**Øssur Winthereig**
*konto 425 6117*



**Til Føroya Sparikassa!**
Tit eru mín peningastovnur, sum hevur Per Højgaard, kunningarráðgeva, í starvi. Tí haldi eg tit skulu vita hetta:

Tíðindaskrivið, sum løgmanskrivstovan skrivaði um meg og Grækaris, var skrivað av tykkara kunningarráðgeva. Eftir persónligari avtalu við Anfinn Kallsberg, løgmann, valdi tykkara kunningarráðgevi at spilla meg og Grækaris út fyri pengar úr privatu lummunum hjá løgmanni.

Per Højgaard gekk runt til redaktiónirnar á Dimmu og Sosialinum við tykkara sparikassablaði í hondini. Eisini vitjaði hann sjónvarpið og útvarpið í somu ørindum. Harafturat ringdi hann til fleiri av journalistunum. Sparikassablaðið var høvið hjá honum at royna at sannføra redaksjónirnar um, at tíðindaskrivið, sum hann hevði skrivað fyri løgmann skuldi brúkast. Tykkara kunningarráðgevi gekk runt og gjørdi spinn-arbeiði fyri løgmann. Tað hevði verið í lagi, um hann hevði spælt við opnum kortum og sagt, at hann var spinndoktari hjá løgmanni. Men tað segði hann ikki eitt orð um. Hann brúkti sparikassablaðið, sum høvi. Eg vil gera mín peningastovn varugan við, at hetta er brot á vanligar etiskar reglur – ikki at siga nær man er í journalistiskum arbeiði.

Í tíðindaskrivinum, sum Per Højgaard skrivar fyri løgmann, skrivar hann um keldulistan í bókini »Skjót journalistin«. Sigur at vit bara hava tosað við mótstøðumenn hjá løgmanni. Per Højgaard velur við vilja ikki at skriva í tíðindaskrivinum, at vit hava tosað við Jørgen Niclasen, partamann hjá løgmanni. Samstundis, sum eg takki mínum peningastovni fyri kreditt í mánaðirnar, eg havi skrivað, skal eg siga, at tað ikki er góður etikkur bara at taka nøkur nøvn burtur úr, tá man endurgevur ein lista.

Per Højgaard skrivar fyri løgmann, at man ikki skal brúka loyniligar keldur. Eg haldi, at í summum førum kann tað vera neyðugt. Í tí sambandinum vil eg minna mín peningastovn um, at júst Per Højgaard, tá hann sendi av Christianborg, var ein av ídnastu brúkarum av loyniligum keldum. Eg haldi tað var í lagi, men haldi tað vera løgið, at hann nú ikki vil kennast við henda vanliga arbeiðsháttt hjá journalistum.

Umframt at brúka sparikassablaðið, sum høvi, so hevur Per Højgaard, uttan at siga sína veruliga orsøk ringt til útvarpsfólk og sjónvarpsfólk í eini roynd at fáa tey at brúka tíðindaskrivið, sum hann hevur skrivað.

Per Højgaard er í privatari vinnu, so hann kann gera, hvat hann vil. Kortini vil eg gera mín peningastovn varugan við, at tað ikki er sambært vanligum journalistiskum reglum ikki at siga í hvørjum ørindum, man arbeiðir.

Tað næsta verður helst, at Per Højgaard sigur ja til at ummæla bókina í útvarpinum.

***PS:** Jørgen Niclasen váttaði hósdagin fyri mær, at tað var skeivt, tá hann hevði sagt, at hann ikki visti, hvat mín samrøða við hann skuldi brúkast til. Hann viðgekk, at hann hevði mistikið seg.*

# Finskur tjóðardagur

TJÓÐARDAGUR

Finnlendingar hátíðarhalda í dag, leygardagin tann 6. desember, tjóðardag sín. Hendan dagin í 1917 samtykti finski ríkisdagurin eina sjálvstøðuyvirlysing. Seinni hetta árið varð Lenin undir stórum trýsti noyddur til at viðurkenna finsku sjálvstøðuna. Long tíð gekk ikki, fyrrenn grannalondini fyri vestan og onnur europeisk lond gjørdu tað sama.

Í sambandi við finska tjóðardagin verður tað møguleiki hjá einstaklingum og feløgum í Føroyum at søkja um stuðul til eitthvørt vinnuligt, mentunarligt ella ítróttarligt tiltak. Stuðulin verður latin við tí fyri eyga at menna nevndu sambond millum Finland og Føroyar. Samlaði stuðulin, ið latin verður, er kr 25.000, og umsóknir kunnu sendast til Finska Aðalkonsulatið á Hoyvíksvegi í Havn. Poul Michelsen er finskur aðalkonsul.

# Jólakonsert við felagskórinum Gøta/Leirvík

JÓLAKONSERT
*Tíðindaskriv*

Sunnudagin kl 16 verður jólakonsert við Felagskórinum Gøta/Leirvík í Gøtu kirkju. Konsertin verður ein rein kórkonsert, har kórið serliga fer at syngja traditionellar jólasangir – bæði føroyskar og útlendskar. Harafturat fer kórið at syngja onkrar sálmar og sangir, ið ikki hava serligt tilknýti til jólini, so sum »Kirkjan hon er eitt gamalt hús« og »Den fyrste song«, ið er sera vakur svenkur kvøldsangur. Á skránni er eisini ein russiskur sangur – »Ave Maria« av Rachmaninov.

Kórleiðari er Martin Mouritsen. Martin er helst best kendur sum dirigentur hjá Føroya Symfoniorkestri, men hann er tó ikki heilt óroyndur sum kórleiðari, tí hann hevur seinastu árini stjórnað einum dreingjakóri Undir Brúnni. Síðani miðjan september hevur Martin vant Felagskórið Gøta/Leirvík, sum í dag telur 30 sangarar, ið koma úr Fuglafirði, Gøtu, Leirvík, av Skálafjørðinum og úr Oyndarfirði. Kórið hevur 16 ár á bakið og Martin er tann sætti kórðleiðarin hjá Kórinum.

Kórið bjóðar tykkum vælkomnum til konsert og gleðir seg at sleppa at lata tykkum hoyra, hvat er fingið av skafti í vetur.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Hini jólatrøini verða tendrað

**Jólatrøini á Argjum, Hvítanesi, í Kaldbak, Norðradali , Kollafirði og á Velbastað verða tendrað í vikuskiftinum um vikuskiftið**

JÓL
*Tíðindaskriv*

Leygardagin verður træið á Hvítanesi tendrað. Havnar Hornorkestur spælir, Sverri Steinhólm, prestur, og Tórfinn Smith, býráðslimur, talar.

Kl. 18.00 verður jólatræið tendrað á Velbastað. Havnar Hornorkestur spælir, Bjarni Bæk, dómpróstur, og Eyðfinnur í Búðini, bygdaráðslimur, tala.

Sunnudagin verður jólatræið í Kaldbak tendrað. GHM spælir, Bergur D. Joensen, prestur, og Beate L. Samuelsen, býráðslimur, tala.

kl. 16.30 verður jólatræið í Kollafirði tendrað. Mogens Tilsted Christensen, prestur, talar.

kl. 17.00 verður jólatræið á Argjum tendrað. GHM spælir, Bergur D. Joensen, prestur, og Bjarti Mohr, býráðslimur, tala.

kl. 18.30 verður jólatræið tendrað í Norðradali. GHM spælir, Bergur D. Joensen, prestur, og Beate L. Samuelsen, býráðslimur, tala.

# Brúdleyp í Føroyum frá 1500-2002

**Nýggja bókin hjá Jóan Paula Joensen er ein siðsøgulig lýsing av brúdleypi í Føroyum frá umleið fornu tíð fram til okkara dagar**

BRÚDLEYPSBÓK
*Tíðindaskriv*

Brúdleypsbókin hjá Jóan Paula Joensen I ærlige brudefolk. Bryllup på Færøerne, sum danska forlagið Museum Tusculanum Forlag, Københavns Universitet gevur út, kemur til Føroyar við Norrønu tann 15. desember.

Henda sera snotiliga og innbundna bókin er ein siðsøgulig lýsing av brúdleypi í Føroyum frá umleið 1500 til 2002. Greitt verður frá giftermáli og brúdleyp og teirri siðvenju ið hevur hingið uppi í hesum og hvussu siðirnir eru broyttir upp gjøgnum tíðina.

Lesarin verður verður tikin við sum gestur til gomul føroysk bygdabrúdleyp eins væl og nýggjari brúdleyp bæði í kirkjuni og í øðrum samkomun. Har verður greitt frá hvussu fólk funnu saman, brúðarvígslu, ofri, gávum, songarleiðing, brúdleypsmati, brúdleypsklæðum, drunni, brúðardansinum og øllum tí sum fólk seta í sambandi við brúdleyp.

Eisini eru allir teir nýggju siðirnir sum polterabend og skemt við moderna brýdleypsborð lýst væl og virðiliga. Bókin byggir á alt tað, sum er til skjals um brúdleyp í Føroyum og høvundurin hevur eisini savna nýtt tilfar frá prestum, studentaskúlanæmingum o.ø. Hetta er fyrstu ferð at brúdleyp í Føroyum er lýst í síni heild í bók við myndum í litum.

Bókin er 300 blaðsíðir í tveimum stórum teigum. Hon hevur eina rúgvu av myndum bæði svart/hvítar og í litum.

Bókin verður í øllum bókabúðunum 17. desember, kanska fyrr. Hon kosar 325 í bókabúðunum.




# Innbrot í høllini á Hálsi

**Hóskvøldið var eitt innbrot í skrivstovuna hjá hallarleiðaranum í ítróttarhøllini á Hálsi. Teldan hjá leiðaranum er burtur, og tað merkir, at hann hevur mist allar upplýsningar, avtalur og annað hjá høllini langt fram í tíðina**

INNBROT
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Leiðarin í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn er í dýrastu neyð. Hóskvøldið breyt onkur inn á skrivstovuna hjá honum og fór avstað við telduni. Hetta merkir, at hann fær onki gjørt, tí á telduni lógu allar avtalur um eitt nú tiltøk og annað langt fram í tíðina.

– Hetta er ræðuligt, og eg fái onki gjørt, tí eg hava onki avrit av hesum nakra aðrastaðni, so eg eri fullkomuliga »lost«, sigur hallarleiðarin. Og hann heitir so staðiliga á viðkomandi, sum hevur tikið telduna, um at koma aftur við henni. Og á foreldur um at hava eyguni eftir einari teldu, sum tey møguliga ikki kennast við.

– Vit mugu fáa telduna aftur, tí har liggja tiltøk inni, sum skulu vera nú og so langt sum 2 ár fram í tíðina, sigur ein forfardur hallarleiðari.

Hallarleiðarin skilir ikki, hví viðkomandi hevur tikið telduna. Onki annað varð tikið úr skrivstovuni hóskvøldið.

*Hóskvøldið var innbrot í skrivstovuni hjá hallarleiðaranum í ítróttarhøllini á Hálsi. Teldan hjá leiðaranum er burtur*
*Savnsmynd*



# Aftursvar til Dagny Joensen

**Bill Justinussen**
*landsstýrismaður*



Dagny Joensen hevur í Dimmalætting 4. desember grein um politikkarar, sum hon kallar sjálvsøknar, har undirritaði var ein, sum fekk hendan dómin. Eg skal als ikki bera meg undan at vera sjálvsøknan í nógvum viðurskiftum. Tó royni eg í mínum starvi at gera tað, sum eg haldi er gott fyri allar føroyingar og ikki bert meg sjálvan – sjálvandi.

Tað var tó ikki hetta, sum er høvuðsinnihaldið í greinini. Sum eg lesi greinina, snýr málið seg um rættin til at liva, sum ein sjálvur vil. Sum samkyndur, sum rúsdrekkanjótari ella hvat tað skuldi verið. Og er tað hetta, Dagny meinar við, eri eg púra samdur við henni. Sjálvandi skulu øll hava rætt til at liva lívið, sum tey sjálvi ynskja.

Hesin rætturin gongur heilt at gáttini til næstan. Tað vil siga, at so leingi, sum ein ikki ger seg inn á næstan, eigur ein at hava rætt at liva so, sum einum sjálvum lystir. Hetta er eisini í tráð við kristnu trúnna. Gud gav okkum fría viljan, júst fyri at vit sjálvi kundu avgera, hvussu vit vildu liva. Hann gjørdi okkum ikki til robottar, sum eru forritaðir til ávísa ætlan. Men samstundis sum Gud gav okkum fría viljan, gav hann okkum eisini vegleiðing um, hvussu vit áttu at liva, fyri at okkum skuldi gangast væl bæði viðvíkjandi andaligum trivnaði, sálarligari vælveru og likamligari heilsu. Tí Hann elskar okkum. Hann slepti okkum ikki upp á fjall fyri at liva okkara egna lív, men hann sendi hirðan við okkum niðan á fjøllini, so hann kundi leiða okkum til grasgrønar fløtur og til hvíldaráir. Fyri at styðja og hjálpa, tá vit ganga gjøgnum brattar skorar. Og tá vit viltust av leið, sendi hann Hirðan – Son sín – at leita eftir okkum fyri at bjarga okkum. Men allan vegin er talan um eitt tilboð og ikki um tvang.

Politikkarar eiga at verja rættindi til frælst lív. Hesin rættur er í tráð við kristnu lívsáskoðanina. Hyggja vit rundan um okkum, er lætt at fáa eyga á, at har ,sum gleðiboðskapurin hevur havt frítt at fara upp gjøgnum øldirnar, hevur eisini persónliga frælsið verið ein av hornasteinunum. Grundarlagið undir at kunna taka undir við gleðiboðskapinum er júst persónliga frælsið til at velja. Tí er hetta ein so týdningarmikil partur av kristna boðskapinum: frælsi til at tala og skriva og frælsi til frítt at velja. Og hetta frælsi – hesi rættindi – eiga politikkarar at verja. Fyrst og fremst rættindi teirra, sum kunnu hugsast at gerast offur fyri ágangi. Tí er neyðugt við skipaðum viðurskiftum á eitt nú rúsdrekkaøkinum. Tí ov mikið rúsdrekka ger seg inn á rættin hjá hinum. Og serliga hjá børnum. Setir tú rættin hjá einum vaksnum upp móti rættinum hjá børnum, eiga børnini eftir míni fatan betri rætt. Tí tey eru veikari. Tey eru minni ment at verja seg. Tey kunnu skjótari gerast sálarliga strongd eitt nú av ógvisligum upplivingum. Slíkar upplivingar koma ofta sum ein avleiðing av ov nógvum rúsdrekka, nú vit viðgera tað. Eg haldi, at øll børn eiga rætt til eitt rúsfrítt umhvørvi. Og tað er greitt, at hesin rættur teirra avmarkar rættin hjá tí vaksna at nýta rúsdrekka. Tí er tað ikki trupult at skilja, at mong ynskja eina avmarkandi rúsdrekkalóg. Júst við persónliga rætti hins einstaka sum grundgeving.

Viðvíkjandi rættindum hjá samkyndum og rættindum hjá kvinnuni at ráða yvir egnum kroppi, sum Dagny Joensen eisini viðger, kunnu vit kjakast væl og leingi um. Men eg fari at lata lesaran sjálvan hugsa um hesi viðurskifti við atliti til tað, sum nevnt omanfyri. Nei Dagny, tað er ikki bert í sjálvsøkni, at hesi viðurskifti verða viðgjørd. Hesir spurningar snúgva seg um mannarættindi, ikki bara teirra, sum aktivt ynskja ein rætt, men eisini teirra, sum tann rætturin gongur útyvir.